Tórshavn, hin 23. juni 2010
Málnr.: 201000401

# HEILSUFRØÐILIGA STARVSSTOVAN

Útgáva 3
**Matvørudeildin**

# Vegleiðing
## Smásøla við virking og/ella pakking

**Endamál:**
Søla av pakkaðum, merktum matvørum og søla yvir disk. Viðgerð av matvørum, úr rá- ella hálvvirkaðari vøru, skera upp, skera í flísar, pakka og/ella umpakka og merkja matvørur. Arbeiði gjørt í rúmi fyri seg og selt í handlinum í smásølupakningi.

**Hølir:**
- Vørumóttøka.
- Goymsla til turrvørur.
- Køli- og frystiskipanir.
- Viðgerðarrúm/-stað.
- Pakkirúm/-stað.
- Útsølurúm/-øki.
- Skiftirúm og vesi til starvsfólk.
- Matstað til starvsfólk.
- Rúm ella bingja til burturkast.
- Stað til returvørur.
- Rúm, við skolivaski, til reingerðaramboð og reingerðarevni.

**Innrætting:**
Støddin á hølunum skal svara til vøruútboðið (slag og nøgd), og hølini skulu plaserast hóskandi hvørt í mun til annað.

**Vegleiðing til innrætting:**
- Vørumóttøka við plássi til útpakking og goymslu av returtilfari.
- Goymslurúm til turrvørur.
- Neyðugar køli- og frystiskipanir. Hesar kunnu vera á goymsluni og/ella í útsølurúminum, um talan er um sjálvtøkuhandil.

**Útbúnaður:**
- Hondvask við flótandi sápa og einnýtishandklæði og ruskspann
- Neyðugar køli- og frystiskipanir við sjónligum hitamátara.
- Neyðugt borðpláss, arbeiðsbeinkir, hillar o.l. í viðgerðarrúminum.
- Uppvaskieindin skal verða minst eitt vask við heitum og køldum vatni, umfram uppvaskimaskina, sum vaskar við 80°C.
- Allur leysur útbúnaður, amboð o.a. skal hanga ella standa upp frá gólvinum á hóskandi hillum e.l., eisini reingerðisamboð.
- Skermast skal rundanum ljós í rúmum har viðgerð av mati fer fram.
- Toygardinur, forhang o.l. skulu ikki verða í rúmum, har viðgerð av mati fer fram.
- Viðgerðarrúm skal vera nóg stórt og soleiðis innrættað, at pláss er fyri at virka tey ymisku matsløgini, ella útbeina og skera kjøt o.a. upp, uttan at vandi er fyri kross dálkan. Er talan um minni viðgerð so sum at skera og pakka ost, er nóg mikið við einum hóskandi staði í goymsluni ella aftanfyri disk e.l.
- Tað skal ikki verða atgongd til viðgerarrúmið beinleiðis útifrá, ella úr øðrum rúmum, sum kunnu elva til dálkan, s.s. goymslur. Vørumóttøkur o.l.
- Pakkirúm-/stað at pakka, umpakka og merkja vørur í/á. Pakking kann fara fram í viðgerðarrúminum, um hetta er nóg stórt og innrættað til tess.
- Vesi, við forrúmi. Hondvask á vesinum ella í forrúminum.
- Skiftirúm kann verða íforrúminum til vesi, um umstøðurnar eru til tess. Plaseringin skal vera soleiðis, at arbeiðsfólk ikki fer ígjøgnum matframleiðslurúm ella onnur ”rein” rúm í egnum klæðum/yvirklæðum.
- Matstað til starvsfólk skal vera burtur frá matframleiðslu. Um starvsfólkunum er loyvt at roykja, skal hetta vera í rúmi fyri seg.
- Eitt ávíst stað til returvørur, so hesar ikki koma í samband við reinar vørur.
- Eitt rúm ella hóskandi stað, atskilt frá matvørum, til reingerðaramboð og reingerðarevni. Eitt skolivask til spillvatn frá reingerðini.

**Tilfar:**
- Veggir, gólv, loft, hurðar og vindeygakarmar skulu vera úr hørðum, sløttum, ljósum tilfari, sum ikki drekkur vatn í seg.
- Í viðgerðarrúminum skal vera rennandi vatn, fránensl í gólvinum og tað skal vera innrættað soleiðis og gjørt úr slíkum tilfari, at tað kann spulast. Allur útbúnaður skal vera úr hørðum og sløttum tilfari, sum ikki drekkur vatn í seg.

**Burturkastskipan:**
- Burturkast skal beinast út úr hølunum minst eina ferð dagliga og beinast burtur á ein fullgóðan hátt, samsvarandi kommunalu skipanini (KOB/IRF).
- Afturlatið rúm/bingja skal vera til burturkastið.
- Ruskrúm ella bingjustað skal kunna spulast / vaskast.

**Reingerð:**
- Allur útbúnaður og amboð skulu gerast rein eftir tørvi, tó minst eina ferð hvønn arbeiðsdag.
- Skrivlig reingerðarætlan skal vera og henda skal fylgjast.
- Reingerðarætlanin skal innihalda arbeiðsgongd til dagliga reingerð og nær meiri umfatandi reingerð og sóttreinsing skal fara fram.

**Persónligt reinføri:**
- Arbeiðsfólk skal bera hóskandi arbeiðsbúnað, sum skal vera reinur.

**Annað:**
- Arbeiðast skal soleiðis, at trygd verður veitt fyri, at liðugtvøran ikki verður dálkað av rávøruni ella nærumhvørvinum.
- Royking er bannað á øllum støðum, har matur verður viðgjørdur ella goymdur.

Mint verður á, at hetta eru vegleiðandi krøv til innrætting.
Mett verður um hølisviðurskiftini og endalig avgerð verður tikin í hvørjum einstøkum føri.